*Í felag fyri teg*

# PEDAGOGBLAÐIÐ

Nr. 1 | Februar 2021 | pedagogfelag.fo




**Sáttmálasamráðingar í bíðistøðu**

**Eftirlønin gav gott avkast**

**Eitt undantaksár merkt av koronu**

**Soleiðis virkar valskipanin**

Útgevari
Føroya Pedagogfelag
Tel. 35 75 76
pedagog@pedagogfelag.fo
www.pedagogfelag.fo

Lagt til rættis
Ingolf S. Olsen - PRESS

Layout
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
info@grafikmaster.fo

Prent
Føroyaprent

Upplag
2.200 eintøk

## NEVND



Jógvan Philbrow
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo



Nikkil Heinesen
Næstformaður
nikkil@pedagogfelag.fo



Valborg Hammer
Skrivari
valborg@pedagogfelag.fo



Gunnvá A. Hansen
Nevndarlimur
gunnva@pedagogfelag.fo



Harald Joensen
Nevndarlimur
harald@pedagogfelag.fo

## UMSITING



**Jógvan Philbrow**
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo



**Birita Hammer Jacobsen**
Umsitingarleiðari
birita@pedagogfelag.fo



**Gudny Benjaminsdóttir**
Bókhaldari
gudny@pedagogfelag.fo



**Bára Sólheim Guttesen**
Málsviðgeri
bara@pedagogfelag.fo

**4** Styttri arbeiðsvika og seniorpolitikkur

**6** Neyðugt við ábótum og broytingum

**9** Nógvar uppgávur eftir at loysa

**11** Sáttmálasamráðingar í bíðistøðu

**12** Betri løn og fyrireikingartíð eru hjartamál

**14** Fundarskráin til ársaðalfundin

**15** Námsfrøðin á Breddan

**17** Eftirlønin gav gott avkast

**19** Eitt undantaksár merkt av koronu

**23** Í felag og eitt felag fyri teg

**25** Kunning til limirnar

**27** Soleiðis virkar valskipanin



ODDAGREIN Jógvan Philbrow, formaður, skrivar

# Í felag fyri teg



Vit skulu nú aftur hava aðalfund. Aðalfundurin er motorurin hjá felagnum, tað er dagurin, har vit hittast at umrøða og taka støðu til framtíðarkósina og eftirmeta tað farna árið. Tað er høvið, har tú sum limur fær gjørt tína ávirkan galdandi.

Hetta vórðu vit snýtt fyri í fjør, og eisini í ár verða vit avmarkað. Tí orsakað av koronufarsóttini verður aðalfundurin ikki hildin soleiðis, sum hann eigur – nevniliga sum ein fagnaður av felagnum og av tykkum limum, sum vilja sýna felagnum og felagsskapinum ans.

Vit fara tó, hóast umstøðurnar eru truplar, at gera okkara besta fyri, at vit kunnu fáa ein so góðan aðalfund, sum til ber. Ein fund, har limirnir fáa gjørt sína ávirkan galdandi, sjálvt um tað hesa ferð í stóran mun verður gjørt talgilt.

Lógir felagsins vóru broyttar fyri nøkrum árum síðani, soleiðis at formansval, nevndarval og ráðsvalini øll gjørdust talgild, tó er hetta sama ikki galdandi fyri allar tættir á aðalfundinum. Frágreiðingin frá nevndini, roknskapurin, uppskot um limagjald og uppskot frá limunum eru alt viðurskifti, ið skulu viðgerast á sjálvum aðalfundinum, og tí skal skipast soleiðis fyri, at limirnir fáa so góða atgongd til aðalfundin sum gjørligt.

Gongur sum ætlað, sleppa álitisfólk at møta til aðalfundin, og tit fáa møguleika at samskifta umvegis tey.

Sum støðan er við koronu, mugu vit bara hava tol og bíða, til umstøðurnar aftur gerast nøkulunda vanligar. Vónandi verður tað um ikki so langa tíð.

Í blaðnum, tú her hevur í hendi, fært tú allar upplýsingarnar, tær tørvar, í sambandi við aðalfundin.

Tú fært upplýsingarnar um valevnini, og um uppskotini, sum støða skal takast til.

Uppskot er um at lækka limagjaldið – eitt uppskot, ið nevndin saman við limum í felagum hevur sett saman.

Harumframt ynskir nevndin at broyta reglugerðina fyri Húsagrunnin, soleiðis at peningurin hjá felagnum betur kann umsitast og brúkast til frama fyri fleiri limir.

Eg vil eisini her takka fyri álitið, nú eg við góðum treysti fari undir eitt nýtt trý ára valskeið.

Felagið er fyri tykkum limir, og uttan tykkum var einki felag.

# Styttri arbeiðsvika og seniorpolitikkur

**Hægri løn og eftirløn, styttri arbeiðsviku og ein virknan seniorpolitikk. Tað eru nøkur av hjartamálunum hjá Gunnvá Akraberg Hansen, námsfrøðiligum atstøðingi, sum bjóðar seg fram til enn eitt skeið í nevndini í Føroya Pedagogfelag**

Eg eiti Gunnvá Akraberg Hansen, eri 53 ár, búgvi í Havn og arbeiði sum námsfrøðiligur atstøðingur.

Seinastu trý árini havi eg sitið í nevndini í Pedagogfelagnum, og hava tað verið trý spennandi ár.

Tað fyrsta, sum nevndin fór at arbeiða við, eftir at eg varð vald í hana, var at hyggja upp á, um felagið framhaldandi skuldi vera fyri bæði námsfrøðingar og hjálparfólk.

Nevndin setti Regin Berg at greina Føroya Pedagogfelag, og hann kom til ta niðurstøðu, at vit øll – námsfrøðingar og hjálparfólk – skuldu standa saman um felagið. Tí saman standa vit sterk.

Hesum taki eg fult undir við. Vit røkka longur við at lyfta saman í einum felag heldur enn at berjast um molarnar í tveimum feløgum.

Tað fer eisini at geva at bíta, nú vit aftur eru farin undir sáttmálasamráðingar. Tað er ein sera spennandi prosess, og eg vil fegin verða verandi í henni, til vit vónandi røkka einum góðum úrsliti.

## Veit hvat rørir seg

Eg arbeiði á dagstovninum Lítlaskógi í Havn og eisini á Sambýlinum Hóvabrekku á Argjum, sum er stovnur undir Almannaverkinum. Tí kenni eg til bæði dagstovnaøkið og serstovnaøkið.

Umframt tað havi eg eisini arbeitt sum stuðul í fólkaskúlanum, so eg veit, hvat rørir seg á teimum ymsu økjunum, og eg vil altíð stremba eftir at gera umstøðurnar betri hjá okkum, sum arbeiða har. Tað er eisini orsøkin til, at eg yvirhøvur bjóði meg fram at umboða tykkum limir í nevndini.

## Styttri arbeiðsviku

Eg havi nøkur hjartamál, sum liggja mær nær at hjarta at fáa framt.

Eitt hjartamál er at fáa stytt arbeiðsvikuna, so námsfrøðingar og hjálparfólk kunnu orka at arbeiða fulla tíð. Í dag er tað vónleyst hjá teimum flestu. Bæði tí – og tað er sjálvsagt tað týdningarmesta – at tey námsfrøðiligu størvini eru so krevjandi, at ein stytt arbeiðsvika er sjálvsøgd, og tí, tey námsfrøðiligu arbeiðsplássini og arbeiðsumstøðurnar har eru soleiðis háttað, at tað ber illa til

at býta tímarnar, um øll starvsfólkini ella bara tey flestu skuldu ynskt at arbeitt fulla tíð við 40 tímar viku.

## Seniorpolitikkur

Eitt annað hjartamál er, at vit á øllum teimum námsfrøðiligu starvsøkjunum fáa ein virknan seniorpolitikk. Í løtuni eri eg tann elsta í nevndini og omma við stórum O, so tað er kanska náttúrligt, at eg gangi høgt upp í seniorpolitikk, men vit skulu helst øll koma har til einaferð, at vit kunnu fáa gleði av hesum politikki – og einari lagaligari skiftistíð, tá pensjónsárini fara at nærkast.

Nú sáttmálasamráðingarnar eru, er tað sjálvandi viðkomandi at hugsa um løn og arbeiðsumstøður, og eingin ivi skal vera um, at eg vil gera mítt besta til at bøta um okkara lønarkor, sum eru alt ov vánalig, bæði tá tað snýr seg um løn og um eftirløn. Eisini er nógv at fara eftir, tá tað generelt snýr seg um at betra okkara arbeiðsumstøður.

## Vil gera mun

Hesi eru hjartamálini, sum í løtuni liggja fremst fyri hjá mær at fáa gjørt okkurt munagott við, men sjálvandi er nógv annað, okkum øllum at frama, sum eg brenni fyri.

Eg vóni at sleppa at halda fram at gera mun, og heiti tí á tykkum kæru limir um at velja meg aftur í nevndina.

***Gunnvá Akraberg Hansen,***
***námsfrøðiligur atstøðingur,***
***valevni til nevndina***



*Gunnvá Akraberg Hansen, námsfrøðiligur atstøðingur, bjóðar seg fram til enn eitt skeið í nevndini*

# NEYÐUGT VIÐ ÁBÓTUM OG BROYTINGUM

**Bjarni Beder, námsfrøðingur og frítíðarskúlaleiðari, bjóðar av á nevndarvalinum. Hann vil millum annað arbeiða fyri, at barnagarðarnir altíð hava eitt hóskandi tal av børnum, fyri betri løn og viðbótum og endurskoðaðari arbeiðstíð. Eisini vil hann lækka limagjaldið**

Sum eitt av størstu yrkisfeløgunum í Føroyum er tað sjálvsagt, at Føroya Pedagogfelag altíð arbeiðir fyri tær, fyri tíni áhugamál, tínum tørvi og ikki minst tínum rættindum.

Framtíðin hjá Føroya Pedagogfelag skal byggja á álit, opinleika og samstarv – ja, tað ljóðar helst slitið, men eg meini tað, og hesum fari eg at virka fyri, um tú sum limur sýnir mær tað álit at velja meg í nevndina í felagnum.

Vit hava eitt gott og á nógvum økjum virkið felag, men treyðugt so, ábøtur og broytingar eru eisini neyðugar.

Í lógum felagsins stendur, at endamál felagsins millum annað er ***"at virka fyri, at fólk við pedagogútbúgving verða sett í øll størv, hvørs uppgáva er at menna børn og ungfólk, eins og tilkomin, sum hava tørv fyri pedagogiskari menning"***. Hetta skal ikki bara verða føgur orð. Tað skal miðvíst arbeiðast fyri hesum. Tað tekur tíð, og samstundis skal tú sum limur verjast í tínum arbeiðsviðurskiftum.

Øll við áhuga í námsfrøðiliga yrkinum vita, at tað er stórt trot á yrkisfólki á námsfrøðiliga starvsøkinum. Nevnda endamál felagsins skal fylgjast, men tað er ikki nóg mikið av námsfrøðingum til øll størvini, og tí er neyðugt við øðrum væl skikkaðum starvsfólki á økinum, so námsfrøðiliga arbeiði verður útint á nøktandi stigi. Og her er talan um tykkum hjálparfólk, sum í løtuni virka, og sum í framtíðini fara at virka á námsfrøðiliga økinum, og tað týðandi arbeiði, sum tit gera so væl.

Tú námsfrøðingur, ið hevur eina sera týdningarmikla útbúgving at brúka á einum so týdningarmiklum øki, tú ert ein avgerandi partur í menningini av Føroya landi. Í tínum starvi skalt tú sambært lóg menna og menta komandi ættarlið í Føroyum.

## Námsfrøðiliga starvsøkið

Seinastu árini eru alsamt fleiri for-

*Bjarni Beder,*
*frítíðarskúlaleiðari,*
*bjóðar seg fram á*
*nevndarvalinum*



skúlar settir á stovn. Forskúlarnir eru komnir fyri at verða, og fleiri námsfrøðingar arbeiða eisini har.

Ein stór avbjóðing við forskúlunum í løtuni er tó, at nógvastaðni kenna foreldrini seg noydd at taka børnini úr barnagørðunum sum 5-6 ára gomul og lata tey byrja í skúlaskipanini, tí onki alternativ er. Eg hugsi, at hetta kann fáa stórar avleiðingar fyri barnagarðarnar og tískil eisini fyri teg sum starvsfólk í barnagarði. Tí í ringasta føri, kunnu fækkandi barnagarðsbørn gera, at tað verður trupult at fáa starv á barnagarðsøkinum nógvastaðni.

Hetta kann ikki halda fram á henda hátt, og tí skal Pedagogfelagið í samráð við arbeiðsgevararnar virka fyri, at barnagarðarnir altíð hava eitt hóskandi tal av børnum og tískil eisini møguleika fyri at bjóða tær at arbeiða á barnagarðsøkinum.

Námsfrøðiliga økið er ikki bara á smábarnaøkinum. Limir í Føroya Pedagogfelag arbeiða á sera nógvum økjum. Nógvir limir arbeiða millum annað á sosialnámsfrøðiliga økinum, eins og støðugt fleiri námsfrøðilig starvsfólk arbeiða í skúlaverkinum.

Sum limur er tað mín fatan, at sosialnámsfrøðiliga økið verður alt ov lítið umrøtt. Hetta økið eigur Pedagogfelagið altíð at leggja stóran dent á. Tí allir limir felagsins skulu hava somu skyldur og rættindi.

Tað gleðir meg at síggja, at tað verður gjørt støðugt meira burtur úr at menna frítíðarskúla- og ungdómsøkið runt um í kommununum. Hetta er gleðiligt, og Føroya Pedagogfelag skal fylgja væl við í hesum og vera ein aktivur viðleikari í at menna økið.

Í Føroya Pedagogfelag eru eisini fleiri limir, ið eru í ymiskum leiðandi størvum. Tað skal einki ivamál vera um, at tað skal loysa seg hjá øllum at vera limur í felagnum, eisini hjá tær, sum er í leiðandi starvi.

## Løn og arbeiðstíð

Rættindini hjá tær sum limi fara altíð at standa fremst í mínum huga. Aðalmálið er, at tú skalt hava munandi lønarhækking næstu árini, og felagið skal framhaldandi aktivt virka fyri at endurskoða arbeiðstíðina.

Viðbøturnar fyri ólagaliga arbeiðstíð eru láturligar, sum er. Tað eru sera nógvir limir, ið arbeiða uttan fyri vanliga arbeiðstíð, men hetta loysir seg snøgt sagt ikki, tí viðbótin er alt ov lág. Eisini her skulu vit arbeiða hart fyri bata.

Fyrireikingartíðin er skjalfest í sáttmálanum fyri námsfrøðingarnar, hetta skal virðast og batar skulu gerast, so allir námsfrøðingar hava møguleika at fyrireika seg til heimsins týdningarmiklasta starv.

## Limagjaldið skal endurskoðast

Tað er aðalfundurin, sum ásetir og broytir limagjaldið. Eg haldi, at tíðin er búgvin at arbeiða fram ímóti at gera eina lógarbroyting, har ásetanin

av limagjaldi verður hugsað av nýggjum.

Limagjaldið kann lækka 0,2 prosentstig, soleiðis at 1,6 prosent av lønini verður goldið í limagjaldi. Síðani skal eisini eitt hámark setast fyri limagjaldinum, ið samsvarar við lægst lønta arbeiðsøki/heiti. Tað merkir, at hjálparfólk í mesta lagi skulu gjalda limagjald samsvarandi stigunum 2 og 3. Námsfrøðingar skulu ongantíð gjalda meira í limagjaldið enn samsvarandi stigi 11, meðan leiðarar í mesta lagi gjalda limagjald samsvarandi stigi 25. Og limagjald skal ikki gjaldast av viðbótum fyri ólagaliga arbeiðstíð.

Við einari sovorðnari loysn, hevði felagið tikið eitt tak fyri allar sínar limir, tí talan hevði í roynd og veru verið um eina lønarhækking. Men ikki minni hevði broytingin vónandi havt við sær, at limirnir fara at støðast betur á tí námsfrøðiliga yrkisøkinum.

Eg veit, at løtuavleiðingin av hesi broyting hevði verið, at minni kom inn í limagjaldi. Men um avleiðingin verður, sum eg vænti, at limirnir fara at arbeiða longur á námsfrøðiliga økinum, so verður tað meira goldið inn seinni í arbeiðstíðarskeiðnum.

## Tú hevur eina góða og týdningarmikla vitan

Aðalfundurin hevur samtykt, at hjálparfólka- námsfrøði- og leiðararáð skulu vera knýtt at felagnum. Eisini er samtykt, at møguleiki er at hava ymiskar fakligar áhugabólkar. Við hesum er eisini breiðari atgongd hjá limunum at hava ávirkan í felagnum.

Føroya Pedagogfelag skal vera eitt sjónligt og gott yrkisfelag, og vit skulu hava sjónligar limir.

## Føroya Pedagogfelag – fyri teg, og uttan ivamál

Sum limur skalt tú altíð vita, at Føroya Pedagogfelag er fyri teg. Sum limur skalt tú altíð kenna teg væl at siga tína hugsan bæði alment og við nevndina.

Føroya Pedagogfelag er ikki ein formaður, ein nevnd og ein umsiting. Føroya Pedagogfelag er tú og tínir starvsfelagar, har formaður, nevnd og umsiting varða av tínum viðurskiftum.

Vit hava eina góða álitisfólkaskipan, ið framhaldandi skal styrkjast, soleiðis at álitisfólkini altíð eru lærd í viðkomandi viðurskiftum.

Sum starvsfólk á námsfrøðiliga økinum skal tað ongantíð vera nakað ivamál, um tú skal vera limur í felagnum ella ikki. Tí vit hava skyldu at sýna hvørjum øðrum samhaldsfesti á økinum. Men felagið skal harafturat arbeiða so íðiliga fyri at tryggja øllum so góðar sømdir og viðurskifti, at limaskapur eisini av tí orsøk altíð verður ein sjálvfylgja. Um hetta ikki eydnast, er næsta stig – enn einaferð – at endurskoða bygnað felagsins.

Eg vil nýta høvið, at ynskja Jógvani Philbrow góða eydnu sum forfólk komandi trý árini, og somuleiðis ynski eg okkum øllum, Anniku, Gunnvá, Nikkili og Tóru góða eydnu við nevndarvalinum.

***Bjarni Beder, frítíðarskúlaleiðari valevni til nevndina***

# Nógvar uppgávur eftir at loysa

**Nikkil Heinesen bjóðar seg fram til enn eitt skeið í nevndini í Pedagogfelagnum. Hann hevur brúkt nógva orku upp á miðling og sjónliggerð av felagnum og námsfrøðiliga fakinum, og millum hjartamálini eru eisini betri lønarkor, fyrireikingartíð, arbeiðsumhvørvi og eitt nýtt felagshús**

Eg eiti Nikkil Heinesen, varð útbúgvin námsfrøðingur í 2012 og arbeiði í Frítíðarskúlanum og ungdómshúsinum í Hoyvík. Í 2015 var eg fyrstu ferð valdur í nevndina, og havi eg seinastu tvey árini verið næstformaður í felagnum. Eg eri giftur, vit eiga tvey børn, og tað triðja er á veg.

Nú standi eg so aftur fyri valið, og vil eg her nema við nøkur av hjartamálunum, sum eg haldi, at felagið eigur at arbeiða við.

## Skulu seta dagsskránna

Pedagogfelagið er og skal verða samhaldsfast. Eitt fakfelag fyri øll námsfrøðilig starvsfólk. Tí eitt stórt og sterkt felag stendur seg í fakfelagsstríðnum mótvegis arbeiðsgevarunum og fær veitt limunum góðar tænastur.

Tá eg kom í nevndina í 2015, var eg varugur við, at felagið ikki hevði ein skipaðan miðlapolitikk. Heimasíðan var gomul, og sera sjáldan vóru greinar í almenna rúminum, ið viðgjørdu námsfrøðiliga økið.

Ferð var tí sett á at útvega nýggja heimasíðu, og miðlafólk var sett. Eg bjóðaði meg í 2018 at átaka mær uppgávuna at røkja og dagføra heimasíðu og Facebook-vanga, og havi eg havt ábyrgdina av hesum síðani.

Í 2020 eydnaðist endiliga at blása nýtt lív í Pedagogblaðið. Tað hevur stóran týdning, at vit hava ein fakligan, námsfrøðiligan pall, sum talar tykkara søk, setir dagskránna og kann kveikja áhugan hjá øðrum miðlum at taka námsfrøðilig viðurskifti upp til umrøðu og viðgerð.

Verði eg afturvaldur, vil eg framhaldandi arbeiða fyri, at felagið skal vera sjónligt, og at Pedagogblaðið eisini gerst ein tíðindaportalur á alnótini við viðkomandi greinum.

## Arbeiðsumhvørvið

Vit síggja í kanningum, at 80 prosent av limunum arbeiða niðursetta tíð, og nógv støðast ikki leingi í sama arbeiði. Á námsfrøðiliga arbeiðsøkinum eru nøkur viðurskifti, ið



*Nikkil Heinesen, námsfrøðingur, bjóðar seg fram til enn eitt skeið í nevndini*

skulu endurskoðast, so at vit fáa betri arbeiðsumhvørvi.

Tað eru nøkur viðurskiftið, sum vit mugu loysa alt fyri eitt við samráðingarborðið. Her kann eg nevna fyrireikingartíð, styttri arbeiðsviku og møguleikan at fara niður í tíð uttan lønarmiss, tá ein nærkast eftirlønaraldri. Eisini eigur at vera hugt eftir møguleikanum at fáa umsorganardagar – dagar, sum einstaklingurin brúkar til umsorgan fyri sær og sínum.

Verði eg valdur aftur í nevndina, farið eg framvegis at arbeiða fyri, at vit fáa skipanir ið veruliga muna, soleiðis at tað verður lættari at gerast gamal á námsfrøðiliga arbeiðsøkinum.

## Fyrireikingartíð

Allir námsfrøðingar skulu hava minst 12,5 prosent av setanarbrøkinum til fyrireikingartíð. Sum fakfólk er tíðin komin, at vit krevja at fáa betri møguleika at virka fakliga.

Arbeiðsgevarin skal, serliga á kommunala økinum, játta nógv meiri pening til økið, soleiðis at fíggjarligt rásarúm verður fyri, at vit starvsfólk kunnu hava skipaða tíð at gera tað neyðuga námsfrøðiliga fyrireikingar- og eftirmetingararbeiði, sum krevst.

## Nýtt felagshús

Nú er nokk tosað. Føroya Pedagogfelag skal hava nýtt felagshús. Eitt útvent og opið hús, sum verður eitt fakligt savningarstað. Her skulu allir limir kenna seg heima. Eitt hús, sum limir eisini kunnu nýta til føðingardagar, konfirmasjónir og líknandi.

Verði eg valdur í nevndina, farið eg at virka fyri einum nýggjum felagshúsi, og at allir limir kunnu kenna eitt tilknýti til okkara felag.

## Stríðist fyri øll

Nevnd felagsins er vald at umboða allar limir. Eg havi alla tíðina eftir besta førimuni roynt at vera røddin hjá hvørjum einasta limi.

Úrslitini hesi seks árini tala fyri seg. Hyggja vit at byrjanarlønini hjá hjálparfólkum, so er hon hækkað við átta prosentum og endalønin við sjey prosentum. Byrjanarlønin hjá námsfrøðingum er hækkað við sjey prosentum og endalønin við 13,5 prosentum. Hetta eru úrslit, sum vit hava rokkið síðani 2015, og eru hetta søguliga góð úrslit.

Tá vit hava verið við á norðurlendsk-

um fundum, øvunda onnur norðurlond okkum okkara úrslit. Okkara svar til hesi er tó, at vit eru ikki komin á mál enn. Lønin skal hækka nógv meiri, og hesum vil eg sjálvandi arbeiða fyri.

Til seinastu samráðingar fingu nakrir kommunalir dagstovnaleiðarar eisini eitt munandi lønarlyft, sum var eitt tiltrongt úrslit í allar mátar.

### Veljið úrslit

Eg vil enda við eini tøkk. Tað hevur verið mær ein heiður at umboða allar limir felagsins í fakfelagsarbeiðinum hesi seks árini, eg havi havt sæti  í nevndini. Takk fyri álitið og møguleikan. Takk fyri tær mongu kveikjandi vitjanirnar, ið eg havi verið á kring alt landið.

Sýna tit mær álit at halda fram í arbeiðinum, lovi eg, at mín partur ikki skal liggja eftir í nøkrum.

Veljið úrslit, veljið Nikkil.

Gott val.

***Nikkil Heinesen, námsfrøðingur valevni til nevndina***

# SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR Í BÍÐISTØÐU

Tað gongur seint við sáttmálasamráðingunum, men Pedagogfelagið samskiftir við mótpartarnar. Tó var ongin veruligur samráðingarfundur avtalaður, tá hetta blaðið fór til prentingar.

At partarnir ikki sita við samráðingarborðið, merkir tó ikki, at arbeiðið í so máta liggur stilt, tí nógv fyrireikandi arbeiði verður gjørt. Fyrr í mánaðinum hevur nevndin sostatt verið á fundi við nýggju nevndina í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, KAF.

Eisini hevur nevndin havt fund við Jenis av Rana, landsstýrismann í millum annað útbúgvingarmálum, har arbeiðsumstøður og átøk at fáa fleiri at nema sær námsfrøðiliga útbúgving vóru umrødd, og við Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttir, landsstýriskvinnu í almannamálum, um átøk at menna trivnaðin á stovnum hjá landinum.

# BETRI LØN OG FYRIREIKINGARTÍÐ ERU HJARTAMÁL

**Annika Østerø er námsfrøðingur við fjølbroyttum royndum, og hon er ein av nýggju kandidatunum til nevndarvalið í Pedagogfelagnum. Millum fremstu mál hennara eru betri løn og eftirløn, veruliga fyrireikingartíð og at vera ein greið rødd úteftir**

Vit sita rundan um borðið og eta døgurða. Eg, mamma og beiggi mín.

Hetta er tíðliga í 1990´unum. Vit práta um, at pedagoganir hava verið til samráðingar, og at teir, grundað á at samfelagið er í kreppu, hava lovað ikki at krevja lønarhækking.

Samrøðan rundan um borðið henda dagin snúði seg um, hvørt tað var rætt, at pedagoganir skuldu vísa so stórt samfelagssinni og als ikki krevja lønarhækking, ella um Pedagogfelagið heldur skuldi stremba eftir at fáa ta lønarhækking, sum upprunaliga var ætlað.

Tíðin var serstøk tá, alt samfelagið stóð fyri hóttafalli, so skilligt er, at hesi atlit blivu tikin.

Pedagogarnir fóru 12 prosent niður í løn. Men hetta fór at verða okkum afturlønt, tá tíðirnar aftur blivu betri, var okkum lovað.

## Rættvísari løn

Nú skriva vit 2021, og enn einaferð standa lønarsamráðingar fyri framman. Men vit mugu tíverri ásanna, at enn er lyftið, sum okkum varð givið tá fyri útvið 30 árum síðani – at lønin skjótt skuldi koma uppaftur – ikki hildið.

Men nú bjóði eg meg sjálv fram at taka ábyrgd. Eg stilli upp til nevndina í Føroya Pedagogfelag, og eg ætli mær í hvussu er at arbeiða hart fyri, at vit fáa rættvísari løn og 16 prosent í eftirløn.

Eg eiti Annika Østerø, eri námsfrøðingur, 40 ára gomul, gift við Ólavi, og vit eiga fýra døtrar. Eg eri fødd og uppvaksin í Klaksvík, men fyri 10 árum síðani fluttu vit til Havnar.

*Annika Østerø, námsfrøðingur,*
*bjóðar av á nevndarvalinum í*
*Føroya Pedagogfelag*



Eg havi nógvar og fjølbroyttar royndir innan námsfrøðiliga yrkisøkið. Eftir lokna útbúgving havi eg arbeitt í barnagarði og vøggustovu, og starvist eg nú í forskúlanum í Skúlanum á Fløtum. Í mínari lestrartíð arbeiddi eg innan serøkið, í umlættingarheiminum Dáanum og Fjálgulon í Klaksvík og sum stuðul í summarferiuni.

Mamma mín, ið arbeiddi á serøkinum sum leiðari, talu- og hoyrilærari og seinni sum autismuráðgevi, er mín størsta fyrimynd – eisini innan námsfrøði.

## Tørvur á batum

Bæði á serøkinum og á dagstovnaøkinum er tørvur á betri viðurskiftum.

Gerandisdagurin hjá einum námsfrøðingi á dagstovnaøkinum er nógv broyttur seinastu nógvu árini: Gera skriv, tilrættisleggja dagin, evnið hendan mánðin er náttúran – hvat gera vit, eygleiðing av Julius, tí hann bítur, foreldraviðtalur, trivnaðurin í barnabólkinum, fundur við barnavernd, Sernám – og eg kundi blivið við.

Okkara kjarnuuppgáva sum námsfrøðingar er at vera í relasjónini – relasjónini við børnini og borgararnar – at reflektera yvir okkara handlingar, umstøðurnar hjá børnunum og borgarunum og umstøðurnar hjá okkum at vera um tey.

## Fyrireikingartíð

Alt hetta grundleggjandi námsfrøðiliga arbeiðið fáa vit ikki gjørt, tá ið vit hava børnini rundan um okkum, ella vit sita ímillum borgarar, sum hava krav upp á og brúk fyri okkara nærveru.

Tíð má setast av til hetta, og tann tíðin er komin, at vit námsfrøðingar mugu og skulu hava veruliga fyrireikingartíð til okkara arbeiði. Tað, at vit kunnu fara til viks og fyrireika okkara arbeiði og samstundis vita, at børnini og borgararnir eru saman við vaksnum, álítandi fólkum, sum kenna sína uppgávu til lítar.

Fyrireikingartíðin skal leggjast uttanfyri kjarnuuppgávuna, men sjálvandi inni í normeringini.

## Kjarnumál

Eg haldi, at tað er sera týdningarmikið, at vit námsfrøðingar hava rættar og góðar arbeiðsumstøður at arbeiða undir. Tí fari eg at heita á teg um at velja meg inn í nevndina hjá Føroya Pedagogfelag.

Míni kjarnumál eru:
- Fyrireikingartíð
- Lønarhækking
- 16 prosent í eftirløn
- At hava eina greiða rødd úteftir

Eg fari at lurta eftir tykkum. Tí eg vil vera tykkara rødd.

***Annika Østerø, námsfrøðingur***
***valevni til nevndina***

# ÁRSAÐALFUNDURIN HEVUR HESA FUNDARSKRÁ:

A. Val av fundarstjóra og skrivara

B. Ásetan av fundarskipan fyri aðalfundin

C. Frágreiðing frá nevndini til góðkenningar

D. Framløga av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu til góðkenningar

E. Framløga av felagsins fíggjarætlan til kunningar

F. Viðgerð av ætlaða virksemi felagsins

G. Val av grannskoðarum

H. Viðgerð av innkomnum uppskotum og ásetan av limagjaldi

**Uppskot:** Broyting í reglugerðini fyri Húsagrunnin.

### Atkvøðast skal um:

Endamál: At keypa eina fasta ogn umframt viðlíkahald ella útbygging av fastognini.
verður broytt til:
Endamál: At keypa fasta ogn umframt viðlíkahald ella útbygging av hesum.

### Ásetan av limagjaldi

Uppskot til aðalfundin at taka støðu til.

### Atkvøðast skal um:

1. Limagjaldið verður 1,6 prosent av lønini (A-inntøkuni), tó í mesta lagi 500 krónur um mánaðin. (Uppskot frá nevndini og innkomið frá limum)

2. Limagjaldið verður óbroytt 1,8 prosent av lønini (A-inntøkuni)

I. Fráboðan um, hvør er valdur í nevnd og sum eykalimur

J. Fráboðan um, hvør er valdur til formann í trý ár

K. Ymiskt



*Tóra Højgaard Joensen, dagstovnsleiðari, bjóðar seg fram til nevndarvalið*

# Námsfrøðin á Breddan

**Tóra Højgaard Joensen stillar upp til nevndarvalið, og hon vil millum annað virka fyri fyrireikingartíð, betri eftirløn, og at námsfrøðin verður vald til sum eitt dygdarfak, sum vit sjálvsagt ynskja at hava í føroyska samfelagnum**

Nú nevndin í Føroya Pedagogfelag skal veljast, vil eg fegin bjóða meg fram, sum eitt av valevnunum, tí eg brenni fyri okkara faki, arbeiðsøki og felagsskapi.

Tær stóru royndirnar við nevndar-arbeiði havi eg ikki, men eg havi ein sterkan vilja og eri ágrýtin og ógvu-liga áhugað í okkara faki og arbeiðs-umstøðum.

Vit eru í einari rembingartíð. Ímeðan fleiri námsfrøðingar fara at arbeiða á skúlaøkinum, fækkast námsfrøðingarnir á bæði dagstovna og -almannaøkinum. Samfelagið manglar hundraðtals námsfrøðingar, og tí ætlar Jenis av Rana, menta-málaráðharri, at taka enn ein náms-frøðiligan flokk upp næsta skúlaár.

Alt gott um tað, men vit eiga at hyggja nærri at sjálvari útbúgvingini og arbeiðskorunum hjá námsfrøð-ingunum sum heild.

Tryggjast má, at námsfrøðingaút-búgvingin verður eftirmett sum skjótast. Fakið námsfrøði má aftur á breddan og gerast primera fakið í útbúgvingini, hetta soleiðis at enn fleiri næmingar velja sær eina námsfrøðiliga arbeiðsleið aftaná lokna skúlagongd.

## Arbeiðsgleði

Sjálvsagt skal námsfrøðiliga starvið vera lokkandi og kveikjandi. Til hetta krevst betri arbeiðssømdir umframt hægri lønarlag hjá limunum í felag-num. Her hugsi eg um, at vit í fram-tíðini eiga at arbeiða fyri, at arbeiðs-gleðin vinnur á sálarligari, fysiskari og etiskari strongd og umsorganar-troyttleika hjá starvsfólkunum á pedagogiska starvsøkinum.

Fyri at gera starvið sum námsfrøð-ingur lokkandi krevst millum annað, at vit í framtíðini fáa eina munandi lønarhækking. Her hugsi eg, at Pedagogfelagið eigur at ganga á odda og samstarva við kommunur og landið fyri at lynna undir ein sjálv-sagdan politiskan vilja at geva limunum í Pedagogfelagnum ta tign og virðing, teir eiga í samfelagnum,

og harvið eisini ta lønarhækking, vit øll hava uppiborið.

Ein lønarhækking vil vera við til aftur at gera námsfrøðiliga starvið lokkandi. Tó so kann lønin ikki standa einsamøll sum einasti faktorur, ið stuðlar undir trivnaðin á tí pedagogiska økinum.

## Onnur týðandi átøk

Her eru nøkur onnur týðandi og neyðug átøk at skapa arbeiðsgleði og trivnað í arbeiðnum:

• Fyrireikingartíð/egintíð til at ráðleggja, fyrireika og eftirmeta eigur at vera tryggjað við lóg. Fyrireikingartíðin eigur í minsta lagi at vera ein fjórðingur av arbeiðstíðini, sum námsfrøðingurin partvíst sjálvur skal ráða yvir.

• Miðvísar eftir- og víðariútbúgvingar eiga at vera fingnar í lag saman við Fróðskapasetri Føroya, har til dømis leiðarar kundu fingið víðariútbúgvingina í pedagogiskari leiðslu goldna, eins og lærararnir fáa tað í dag.

• Vit eiga somuleiðis eisini at hugsa um eftirtíðina og arbeiða okkum fram ímóti einari hækking av eftirlønini hjá limunum.

• Sum fakbólkur eiga vit at stremba eftir at gerast nógv sjónligari í samfelagnum. Eitt nú kundi Pedagogfelagið arbeitt við felags virðisátøkum, sum mynda limirnar og uppgávur teirra í felagnum, og brúkt hesi, tá námsfrøðiliga arbeiðið verður sett á breddan í felagnum.

• Eisini eiga vit at seta sjóneykuna á føroyska námsfrøði, og tað er mítt ynski, at Pedagogfelagið aftur fer at arbeiða við at seta føroyskan pedagogiskan fakfagnað á breddan og harvið gera dygdargóða arbeiði hjá limunum sjónligt í felagnum.

Eitt er vist, tað verður nógv gott arbeiði framt av limum felagsins, sum vit errin eiga at vísa fram, og somuleiðis bjóða pedagogum úr øðrum londum at koma til okkara at fáa íblástur og hugkveikjan av føroyskari námsfrøði.

Tað skal eingin ivi vera um, at limirnir í Føroya Pedagogfelag gera sítt fyri at halda lív í námsfrøðiliga fakinum, men hvør man tann politiski viljin vera.

Hví sæst politiski viljin at menna fakið námsfrøði ikki, og man tað ikki bera til í felag at fara í enn fleiri samstørv, bæði politisk og fakfelagslig, fyri á tann hátt gera enn meira fyri limirnir?

Navn mítt er Tóra Højgaard Joensen, eri 43 ár, ættað úr og búsitandi í Havn og gjørdist námsfrøðingur á Føroya Læraraskúla (nú Námsvísindadeildin á Fróðskaparsetrinum) í 2009. Síðani tók eg bachelor-prógv á Stavanger Universitet, og havi eisini lisið til cand.pæd.ant. á DPU (Danmarks Pædagogiske Universitet). Arbeiðsstaðurin er á Dagstovninum á Velbastað, har eg eri leiðari.

Við støðugum áræði, er tað mítt ynski at arbeiða fyri at betra um arbeiðskorini hjá okkum øllum í Føroya Pedagogfelag og á tann hátt vera við til at gera ein mun.

***Tóra Højgaard Joensen,***
***dagstovnsleiðari,***
***valevni til nevndina***

# EFTIRLØNIN GAV GOTT AVKAST

**Allir heimsins virðisbrævamarknaðir hava merkt sviðan av koronu, men eftirlønarkundarnir hjá LÍV kunnu kortini fegnast um eitt gott avkast, tí har hava tey dugað at fingið tað besta burtur úr støðuni**

INGOLF S. OLSEN

Samanborið við nógv onnur eftirlønarfeløg høvdu tey, sum hava sína eftirlønaruppsparing hjá tryggingarfelagnum LÍV, eitt gott avkast í fjør. Limirnir hjá Pedagogfelagnum hava sína eftirlønaruppsparing hjá LÍV, sum felagið eisini umvegis p/f Fakfelag eigur sín part í.

Avkastið var ímillum 5,2 og 1,7 prosent alt eftir, hvussu langt kundin er frá eftirlønaraldrinum.

Koronufarsóttin setti annars síni myrku fingramerkið á alt árið 2020, og tað merkti í stóran mun eisini allar heimsins fíggjar- og virðisbrævamarknaðir.

Partabrøvini fullu nógv, tá farsóttin tók seg upp, men júst hetta dugdi LÍV at venda til egnan fyrimun og harvið eisini til fyrimuns fyri tann einstaka eftirlønarkundan.

– Tá partabrøvini fullu, gjørdu vit tað, at vit keyptu meira av partabrøvum, enn vit annars plaga, tí vit væntaðu, at tey fóru at javna seg og kanska hækka aftur rættiliga skjótt. Og tað er júst tað, sum er hent, og tí hava vit og eftirlønarkundarnir vunnið upp á hesa íløgustrategiina, sigur Arnfinnur Gudjónsson, íløgu- og stjórnardeildarleiðari í LÍV.



*– Tá partabrøvini fullu, gjørdu vit tað, at vit keyptu meira av partabrøvum, enn vit annars plaga, tí vit væntaðu, at tey fóru at javna seg og kanska hækka aftur rættiliga skjótt. Og tað er júst tað, sum er hent, sigur Arnfinnur Gudjónsson, íløgu- og stjórnardeildarleiðari í LÍV*

LÍV hevur eina eftirlønarskipan, sum er lívslagað til tann einstaka eftirlønartakaranum. Tað merkir, at íløgurnar vera gjørdar við atliti at, hvussu langt tann einstaki kundin er frá sínum eftirlønaraldri. Tað merkir aftur, at avkastið eisini er ymiskt alt eftir, hvussu langt er til eftirlønaraldur (sí talvuna).

| Ár til eftirlønaraldur | 30 | 15 | 5 | 0 |
|---|---|---|---|---|
| Avkast | 5,20% | 5,20% | 3,80% | 1,7% |

*Talvan vísir avkastið hjá kundum við marknaðarrentu, sum høvdu ávikavist 30, 15, 5 og 0 ár til eftirlønaraldur*



## Frágreiðing frá nevndini fyri 2020:

# Eitt undantaksár merkt av koronu

**Virksemið hjá Pedagogfelagnum var í fjør merkt av avlýsingum og neyðloysnum orsakað av koronufarsóttini. Men tað gav tó nevnd og felagsskrivstovu høvi at arbeiða við øðrum málum, sum hava ligið á láni. Eitt nú er samskiftið og kunningin til limirnar styrkt**

So er 2020 loksins farið aftur um bak, og skulu vit, ið mynda leiðsluna í felagnum, aftur taka saman um farna árið.

### Takk til allar hetjurnar

Vit eru í hornatøkum við eina heimsfarsótt. Tit á námsfrøðiliga starvsøkinum hava tikið sera stóra ábyrgd hetta árið. Uttan tykkum mólu samfelagshjólini ikki, og fleiri av okkara borgarum høvdu staðið í eini sera svárari støðu.

Tey námsfrøðiligu starvsfólkini vóru millum tey fyrstu í heiminum, sum lótu dyrnar upp og uttan nevniverda verju fóru til arbeiðis. Út til eina sjúku, sum eingin veruliga kennir avleiðingarnar av. Hetta gjørdu vit, tí vit elska okkara arbeiði, eru góð við tey, ið vit eru um, og hava eitt brennandi ynski um at verða ein samfelagsligur stuðul, soleiðis at samfelagið ikki steðgar upp.

Summi tykkara settu egna heilsu í váða, onkur fekk smittuna, onnur vórðu koyrd í sóttarhald, og fleiri tykkara blivu eisini sett at arbeiða við smittaðum borgarum og vera um borgarar í sóttarhaldi. Í stóran mun, uttan nakra serliga eyka verju.

Tað er sólaklárt, at dagstovnar, serstovnar og námsfrøðilig starvsfólk eru hornasteinar í samfelagnum. Um tit ikki vóru til arbeiðis, rukku endarnir í samfelagnum ikki saman. Vóru børnini ikki á stovni, kundu foreldrini ikki farið til arbeiðis.

### Koronuavlýsingar

Avbjóðingarnar, ið felagið hevur staðið við, hava eisini verið merktar av Covid-19-støðuni.

Lítið vardi tað okkum, at aðalfundurin, ið skuldi verða 21. mars 2020, fyrst mátti útsetast, og sum tíðin



leið, máttu vit heilt sleppa tankanum um at halda aðalfundin. Avmarkingarnar, sum farsóttin hevði á tiltøkini hjá felagnum, steðgaðu ikki har, tí álitisfólkaskeið, senior-dagur, garðsveitslan og tey trý ráðini vórðu rakt av avlýsingum og avmarkingum og tillagingum av virkseminum. Eisini bleiv ein stórur felags álitisfólkadagur, har álitisfólkini hjá teimum seks feløgunum í Fakfelagssamstarvinum skuldu hittast, avlýstur.

Ætlanirnar vóru nógvar, har vit høvdu serligt ynski um at økja um nýtsluna av húsinum í Tungugøtu til ymisk smærri limatiltøk.

Tað hevur tó eydnast okkum at halda tann fyrsta av fýra pørtum av álitisfólkaskeiðunum fyri álitisfólkunum, umframt at ein álitisfólkaveitsla hevur verið hildin. Álitisfólkaveitslan er ætlandi eitt afturvendandi tiltak, har vit fáa takkað álitisfólkunum fyri teirra stríð fyri limirnar.

Leiðaradagurin er avlýstur ikki færri enn tvær ferðir, vegna farsóttina, og hevur tað verið serliga keðiligt, tá vit ikki hava eitt virkið Leiðararáð. Hetta hava vit í felagnum og fleiri leiðarar saknað.

Vit hava somuleiðis brúkt drúgva tíð upp á og roynt at fáa greiðari koronu-vegleiðingar, samstundis sum vit hava roynt at fingið heilsumyndugleikarnar at minnast til, at starvsfólk og borgarar í Almannaverkinum eisini skulu raðfestast – ikki minst hvussu neyðugt tað er, at tey verða koppsett.

## Lógin um almannatrygd

Leingi hevur Pedagogfelagið strongt á at fáa eina dagførda lóggávu á almannaøkinum, hetta mál er loksins rokkið. Til valið í 2015 var hetta partur av okkara "Trý ting á ting"-ynskjum, so vit kunnu ikki annað enn fegnast um, at hetta hevur eydnast.

## Pedagogblaðið

Tað eru nøkur ár síðani, at blaðið kom regluliga út. Sigast kann ikki annað, enn at blaðið hevur verið nógv saknað. Vit hava fingið nógvar áheitanir frá limum um at fáa lív í blaðútgávuna aftur. Nevndin hevur í eina tíð umrøtt, í hvørjum formi blaðið kundi verið givið út aftur. Í samband við arbeiðið at endurskoða bygnaðin av pedagogfelagnum í 2017/18 var eitt av ynskjunum, at blaðið skuldi gevast út aftur.

Vit vilja hava eitt fakblað, har limirnir kenna seg aftur í innihaldinum. Ein pallur har námsfrøðilig starvsfólk og almenningurin kann heinta vitan um okkara arbeiðsøkið. Avtala var gjørd við Ingolf S. Olsen, journalist, um at framleiða blaðið í 2020 umframt hetta aðalfundarblaðið sum royndarbløð.

Seinasta aðalfundarárið eru tískil fýra eintøk givin út.

Nýggj endurskoðað avtala skal gerast fyri 2021. Nevndin metir, at tað hevur stóran týdning at limirnir hava ein fakligan pall. Tí hevur tað týdning at finna ein leist, soleiðis at blaðútgávan verður løgd í trygga legu, so hetta ikki dettur niður fyri aftur.

## Sáttmálasamráðingar

Sáttmálasamráðingar hava fylt nógv seinasta partin av árinum, og hava samráðingarnar drigið út, millum annað av tí at Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar vóru í verkfalli í november mánað. Somuleiðis hevur kommunuval verið, og nýggj nevnd skuldi setast í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, KAF.

Nevndin hevur avtalað at seta nakrar dagar av saman við KAF, har lønardeildin hjá Fíggjarmálaráðnum vónandi eisini verður við. Har er ætlanin at umrøða avbjóðingarnar á námsfrøðiliga økinum, og hvørjar loysnir kunnu vera fyri at vinna longur fram á leið. Fyri okkum er spurningurin, hvussu vit fáa virkað fyri, at námsfrøðiliga yrkisøkið verður meira lokkandi og styrkt í framtíðini.

Tað er veruleikin, at sáttmálin hjá okkara limum er verri á ymiskum økjum, enn sáttmálarnir hjá teimum, ið vit samanbera okkum við.

Eingin beinleiðis samráðingarfundur hevur verið millum partarnar síðani november, tá kommunuvalið var.

## Stytt arbeiðsvika

Nógv hevur verði prátað um eina stytta arbeiðsviku, og hevur eitt uppskot eisini verið um tað í Løgtinginum.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Helgi Abrahamsen, hevur mett, at kostnaðurin fyri at stytta arbeiðsvikuna úr 40 tímum niður í 37 tímar, fer at vera umleið 750 milliónir krónur.



*Nevndin í Føroya Pedagogfelag. Úr vinstru: Valborg Hammer, skrivari, Nikkil Heinesen, næstformaður, Jógvan Philbrow, formaður, Gunnvá A. Hansen, nevndarlimur, og Harald Joensen, nevndarlimur.*

*Mynd: Føroya Pedagogfelag*

Saman við Fakfelagssamtarvinum hava vit sett ein bólk við serkunnleika at granska veruligu avleiðingarnar av broytingini. Arbeiðið skal vera liðugt í summar. Bólkurin er mannaður við búskaparfrøðingum, stjórnmálafrøðingum og fíggjarserfrøðingum.

Verkætlanin skal lýsa fyrimunir og vansar við at stytta arbeiðsvikuna og geva eitt betri boð upp á, hvør veruligi kostnaðurin av einari slíkari broyting er.

Vit ivast ikki í, at nógv er at vinna við at stytta um arbeiðsvikuna.

## Verja rættindi hjá tí einstaka

Felagið hevur í hesum aðalfundarárinum havt ymisk mál hjá einstøkum limum á borðinum.



- limir hava fingið útgoldið manglandi eftirlønir, upp í fleiri tíggju túsund krónur,
- limir hava fingið rættað starvsaldur,
- limir hava fingið rættað lønarstig,
- limir hava fingið endurgjald fyri manglandi setanarskriv

og nógv annað.

Tað kemur fyri, at limir ikki fáa tey rættindi og ta løn, tey eiga, og kemur hetta mangan fyri orsakað av mistøkum í telduskipanum og/ella gloymd "flugubein". Vit hava eisini fingið nógvar áheitanir frá fólki, sum hava lagt til merkis, at teirra limagjald brádliga er steðgað. Tí er gott at nærlesa lønarseðilin hvønn mánað fyri at ansa eftir, at alt er, sum tað skal vera.

## Meiri sjónlig

Vit gleðast um, at tað námsfrøðiliga arbeiðið hevur verið meira í brennideplinum í almenna rúminum ta seinastu tíðina.

Hetta kemur ikki av ongum, men vit halda, at hetta er eitt úrslit av, at felagið fyri nøkrum árum síðani miðvíst vildi seta dagskránna, ávirka á røttum samfelagsligum støðum og vera meira sjónligt.

Tað er vorðið meira vanligt, at námsfrøðingar verda spurdir, tá miðlar varpa ljós á normeringar, ymiskar skipanir og annað á okkara arbeiðsøki.

Vit skulu her takka fyri farna árið og ynskja øllum ein góðan aðalfund.

# Í FELAG OG EITT FELAG FYRI TEG

**Tá freistin at stilla upp til formansvalið í Føroya Pedagogfelag var úti, hevði ongin bjóðað sitandi formanni av. Tískil er tað greitt, at Jógvan Philbrow heldur fram sum formaður næstu trý árini. Fyrireikingarnar til eina valgrein endaðu tí í staðin við hesi støðu- og takkargrein**

Yvirskriftin á hesi grein hevur hesi seinastu seks árini, eg havi verið formaður í Pedagogfelagnum, verið leiðtráðurin hjá mær og okkum í nevndini.

At skapa og samráða okkum til tey bestu korini hjá tykkum limum hevur alla tíðina verði eitt aðalmál.

Samstundis hava vit styrkt tykkara møguleikar at ávirka. Eitt nú vóru ráð sett á stovn við tí í huga.

Pedagogblaðið kemur nú aftur út – og er hetta eisini ein liður í at styrkja sambandið við tykkum limir og samstundis ein pallur at varpa ljós á tykkara arbeiði, øllum samfelagnum at frama.

Vit hava viljað verið eitt felag, sum er hugað fyri loysnum og fer í samskifti við arbeiðsgevarar og samstarvspartar annars. Tað er sjálvandi eitt sindur missjavnt, akkurát hvussu væl hetta hevur eydnast. Verandi samráðingar bera tó møguliga boð um, at alt ikki altíð skal vera akkurát tað sama. Tó er ov tíðliga at siga nú, hvussu framtíðin fer at laga seg.

## Normeringar og arbeiðsumhvørvið skulu takast í størri álvara

Stóra takið er nú at fáa arbeiðsumstøðurnar á breddan, her er tað serliga møguleikin at vera fakligur, ið skal á breddan. Fleiri tykkara skulu í alt ov stóran mun arbeiða einsamøll stórar partar av degnum. Arbeiða uttan møguleika at gera tað, tit vita eigur at vera gjørt, tí tit eru ov einsamøll.

Avleiðingarnar av at vera einsamallur til arbeiðis kunnu vera álvarslig-



ar. Í Danmark hevur undurmanning á serligum bústøðum kostað lív. Í næstan øllum umstøðum og arbeiðsstøðum hevur tað ein fakligan kostnað, eisini í arbeiðnum á púra vanligum dagstovnum.

Eg havi nú verði formaður í seks ár og havi gjørt mær nakrar royndir – okkurt slagið er vunnið, og okkurt er tapt. Okkurt hevur eydnast, og okkurt er miseydnað. Tað vil so vera í einum slíkum starvi. Altíð hevur málið tó verið at styrkt og bøtt um tykkara støðu sum limir í Pedagogfelagnum og arbeiðstakarar á námsfrøðiliga starvsøkinum.

## Verkfalsrætturin

Stórur ágangur er á verkfalsrættin hjá okkum og hinum feløgunum, ið hava limir, sum arbeiða við umsorgan. Nýggjastu tónarnir eru, at onnur enn vit á arbeiðsmarknaðinum skulu kunnu gera av, í hvønn mun vit sleppa at leggja arbeiðið niður, tá eingin sáttmáli er galdandi ímillum partarnar. Verkfalsrætturin er síðsta og sterkasta vápnið hjá einum fakfelag, og tað má bera til hjá einum fakbólki at siga "nei, vit koma ikki til arbeiðis undir hasum treytunum, ið arbeiðsgevarin ætlar at seta".

Tað verður sagt, at hesi viðurskifti eiga at vera øðrvísi skipað í einum framkomnum samfelag. Um tað so eisini var galdandi, at tit limir fingu eina løn og arbeiðsumstøður, sum tit hildu vera hóskandi í einum framkomnum samfelag, so hevði tað kanska borið til hjá myndugleikunum og arbeiðsgevarunum at málborið seg soleiðis.

## Framtíðin

Normeringar og arbeiðsvikan eru tvær av størstu avbjóðingunum, sum vit standa yvir fyri í dag. Hesi viðurskifti skulu fáast í rættlag.

Eg havi áræði at halda fram sum formaður og haldi, at vit sum felag eru komin longur fram á leið, og hava flutt umstøðurnar og viðurskiftini hjá limunum rætta vegin – tó at tað enn er langt á mál á fleiri mótum.

Eg takki fyri álitið og skal gera mítt at røkka enn longur fram á leið.

***Jógvan Philbrow, formaður***

# Kunning til limirnar

## Limaskapur

***Nýggir limir***

Fyri at gerast limur í Føroya Pedagogfelag, er tað týdningarmikið, at ein boðar arbeiðsgevara sínum frá, at limagjald skal flytast til felagið.

Harumframt eiga nýggir limir at skráseta seg á heimasíðuni undir hesum leinkinum: http://pedagogfelag.fo/limaskapur

Ein gerst ikki limur bert við at skráseta seg á heimasíðu felagsins, og tí hevur tað týdning eisini at boða arbeiðsgevaranum frá ynskinum um limaskap. Harumframt er tað av alstórum týdningi, at allir limir, eisini nýggir, kanna sín lønarseðil fyri at vita, um limagjald verður flutt av lønini til felagið.

***Limir sum skifta starv***

Týdningarmikið er eisini, at limir sum skifta starv, boða arbeiðsgevaranum frá ynskinum um limaskap og fylgja við á lønarseðlunum, um limagjald verður flutt. Hetta fyri at tryggja, at teir ikki detta úr felagnum.

Orsøkin til hetta er millum annað, at limaskapur og tryggingarnar, sum felagið hevur teknað vegna limir sínar, hanga neyvt saman. Hetta merkir, at um onki limagjald kemur til felagið, so er ein heldur ikki fevndur av tryggingum felagsins.

Tá ið limir skifta starv, bústað, broyta navn ella annað, hevur tað týdning at boða felagnum frá hesum fyri at tryggja, at limirnir verða rætt skrásettir í skipanini hjá felagnum, soleiðis at felagið kann seta seg í samband við teir umvegis teldupost, telefon ella post. Broytingar í upplýsingum fara eisini fram á hesum leinki: http://pedagogfelag.fo/limaskapur/

## Um skrivstovuna

Skrivstovan er vanliga opin mánadag til fríggjadag kl. 09.00 - 15.00.

Telefonin svarar mánadag til hósdag kl. 09.00 - 15.00.

## Brúka húsið í Tungugøtu

Eftir eina størri umbygging í húsinum er nú betri møguleiki hjá limum at brúka húsið til smærri fundir og tiltøk eftir avtalu.

Køkurin er fluttur niður í kjallaran, har limir altíð eru vælkomnir á gátt til ein kaffimunn. Møguleiki er at lesa ymisk bløð og faklig tíðindarit.

## Limaportalur

Limir kunnu gerast partur av limaportalinum hjá felagnum, sum gevur limum eitt limakort, ið kann brúkast til at fáa avsláttur í ymsum handlum kring landið. Limir kunnu skráseta seg á limaportalinum á hesum leinki: http://limaportalurin.pedagogfelag.fo



Limakortið gevur avsláttur á hesum støðum. Minst til at vísa limakortið, tá tú skal keypa.

## P/F Bygma Balslev
10% í avsláttri fyri kontantkeyp.

Ikki galdandi fyri sertilboð og útsøluvørur.

## Bilrøkt
15% í avsláttri til allar limir upp á olju og oljuskift, dekk, reingerð og rustviðgerð.

## P/F Jógvan Weihe
10% í avsláttri upp á allar vørur, tó ikki, tá talan er um tilboð og útsølu.

## Valdemar Lützen Byggibúð & Lásatænasta & Rustfrí Heilsøla
15% av øllum keypi í handli okkara. Tó so bjóða vit 10% av el-maskinum.

## Vælvera Fitness
Tilboð til limirnar í Føroya Pedagogfelag.

## Brá (Norðskáli)
10% í avsláttri av allari vøru, undantikið útsøluvøru og niðursetta vøru.

## Sorella
10% av øllum klæðum – er bert galdandi fyri klæðir.

Um vøran er niðursett, verður avsláttur ikki latin.

## Hennara
10% Í avsláttri av vørum, sum ikki eru niðursettar frammanundan.

## Teldutænastan
15% í avsláttri í handlinum og 10% á verkstaðnum, undantikið tilboðs- og útsøluvørur.

# Soleiðis virkar valskipanin

**1.**
Tú fært ein teldupost frá “survey.exact.dk” við heitinum “Pedagogfelagið, val av nýggjum nevndarlimum 2021”.

Telduposturin inniheldur eitt leinki, ið tú síðani skal trýsta á. Leinkið leiðir teg til atkvøðusíðuna.

Um tú ikki hevur móttikið teldupostin fríggjadagin 19. februar 2021, kann tað vera, at

a) Telduposturin er farin í spam/uønsket mail/óynsktur teldupostur ella líknandi.

b) Føroya Pedagogfelag hevur skeivan teldupost ella ongan teldupost hjá tær, send so teldupost til pedagog@pedagogfelag.fo at kanna tíni viðurskifti.

c) Tú ert ikki limur. Send teldupost til pedagog@pedagogfelag.fo fyri at kanna tíni viðurskifti.

**2.**
Fyrsta síðan gevur tær eitt yvirlit yvir, hvør bjóðar seg fram við mynd. Trýst á “Næsti” fyri at koma til sjálva atkvøðusíðuna.

**3.**
Á valsíðuni sært tú tey fimm valevnini til nevndarvalið. Tú kanst atkvøða við at trýsta á navnið á viðkomandi valevni. Um tú ongan ætlar at velja, trýstir tú á “Næsti”.

**4.**
Eftir at tú hevur atkvøtt, fert tú á næstu síðu. Um tú ynskir at luttaka talgilt á aðalfundin 6. mars 2021, skal tú svara “Ynski at luttaka á aðalfundin 6. mars 2021.” ella um tú ikki ætlar, so trýstir tú á “Luttaki ikki”.

Fyri at koma víðari mást tú trýsta á “Næsti”.

Valskipanin verður umsitin av J. Herluf Sørensen, og verður valúrslitið kunngjørt á aðalfundinum.

Valskipanin til nevndarvalið letur aftur fríggjadagin 5. mars klokkan 12.00.

Tvær atkvøðugreiðslur vera eisini á sjálvum aðalfundinum, og fara tey, ið hava boðað frá talgildari luttøku, at fáa leinki til atkvøðugreiðslurnar sendar á sjálvum aðalfundinum. Atkvøðast kann bert um hesi uppskotini, meðan aðalfundurin er.



# Eftirløn

Til eitt langt virkið lív, eftir at farið er av arbeiðsmarknaðinum, er gott við eini persónligari uppsparing.

**Lat okkum hjálpa tær at seta saman títt fíggjarliga trygdarnet.**

liv.fo